LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

OPEL ASCONA 1.6
árg. 86, koyrt 160.000 km, til sølu fyri 8.000 kr. Nýtt Pioneer cd-anlegg + hátalarar fylgir við. Bilurin koyrir væl.
Tlf. 455279

TIL SØLU
WV Transporter T4 vøruvognur, 65.000 km, kr. 78.000.
Tlf. 315122 ella 215122

TIL SØLU
VW Transporter T4 minibussur (lítla koyrikortið), árg. 92, 170.000 km/motorurin 25.000 km, kr. 57.000.
Tlf. 315122 ella 215122

TIL SØLU
Toyota Corolla 1,8 diesel, árg. 84, liftback, til sølu sum eykalutir, heilur ella í bitum! Motorurin er kaputt.
Tlf. 442181

PAJERO
árg. 88, langa modellið, til sølu.
Tlf. 254803

TIL SØLU
Fýra heilársdekk, 175/70R14, á felgum, til sølu. Við fylgja 8 skálir, harav 4 óbrúktar og eitt sett av lítið brúktum »No Problem« ketum.
Tlf. 265435

FORD SIERRA
árg. 86, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 316226

TIL SØLU
Toyota Corolla 1,3 E, árg. 8/5-01, til sølu um hóskandi boð fæst. Tlf. 448174, e. kl. 18, ella
Tlf. 257017, kl. 12-13.30

LAMELL DEKK
Fýra nýggj dekk av slagnum Blizzard Bridgestone, std. 175/70R14" – til sølu fyri einans 3.000 kr. Nýprísur 4.100 kr.
Tlf. 223217

JEEPUR!
Árg. 00, til sølu um hóskandi boð fæst. Koyrt 38.000 km, bláur/gráur.
Tlf. 223217

OPEL KADET
árg. 87, hevur bert koyrt 95.000 km, hevur nakað av rusti, men annars í góðum standi, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 315318 - 253318

EYKALUTIR
til Toyota Landcruiser HJ 60 til sølu.
Tlf. 283753 ella 449045

EYKALUTIR
til Subaru, árg. 86, biliga til sølu.
Tlf. 283753 ella 449045

GEARKASSI YNSKIST
Gearkassi til Ford Sierra 2.3 Diesel, árg. 85 ynskist.
Tlf. 219899

MORRIS MINI 1.3
árg. 78 til sølu. Plátulutir fylgja við.
Tlf. 215594

TIL SØLU
Ein Nissan Sunny, árg. 88, biliga til sølu. Er sera økonomiskur og í góðum standi
Tlf. 223151, e-post hogni@37.com

TIL SØLU
Toyota Carina E 1.8 GLI til sølu. Skrásettur fyrstu ferð 96.10. Hevur koyrt 72.000 km. 15" alufelgur við góðum dekkum, umframt 4 góð heilársdekk á felgum. Hevur El-rútur, el-spegl og sentrallás. Er í góðum standi. Prísuppskot 115.000 kr.
Tlf. 264767

OPEL ASCONA 1.6
árg. 86, koyrt 160.000 km, til sølu fyri 8.000 kr. Nýtt Pioneer cd-anlegg + hátalarar fylgir við. Bilurin koyrir væl.
Tlf. 455279

FORD SCORPIO 1.4i
til sølu sum eykalutir.
Tlf. 312998 ella 255333

ALUFELGUR
4 stk. alufelgur 7x 195/55-15 við dekkum – 5 hol. Passar til Toyota Carina E, Avensis til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 211838 ella 310488

TOYOTA COROLLA
3 ára gamal Toyota Corolla 2000 diesel, sera væl hildin, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 255381

HVØR RENDI Á?
Veit nakar, hvør rendi á mín bil á P-økinum við Landssjúkrahúsið mánadagin 4. mars 2002? Bilurin er ein bláur Peugeot 206 cc, skrásetingarnr. HAWAII. Vinarliga ring
Tlf. 255363

BMW 320i
Árg. 84, koyrt 160.000 km, í góðum standi, v/ spoilarasetti biliga til sølu.
Tlf. 317332 - 243446

GOLF
árg. 1988, kom og gev eitt boð.
Tlf. 445178

BILAR TIL SØLU
BMW 320i árg. 93. BMW 525 TDS árg. 94. BMW 525 TDs árg. 98, Mercedes 300D, árg. 97, VW Golf 1.9 D árg. 96. Autoimport
tlf. 322560, 217778 ella 218778

MITSUBISHI LANCER
1.6 árg. 87. Við sportsfelgum og dekkum. Til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 457504 ella 228220

TOYOTA COROLLA
st. car árg. 83, til sølu. Hevur plátur.
Tlf. 211514

BMW 525
turbo diesel, árg. 93 til sølu um hóskandi boð fæst. Kann síggjast á www.bil.fo
Tlf. 213577

FORD ESCORT 1.6i
árg. 95, í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 332643

OPEL KADETT 1.3
árg. 88, við skaða uttan, til sølu til hægstbjóðandi. Hevur plátur og er sýnaður síðsta heyst í oktober.
Tlf. 312697

TOYOTA HIACE
diesel, árg. 86, til sølu.
Tlf. 215291

SUZUKI BALENO
frá sept. 1996, myrkbláur við trimum hurðum, koyrt 65.000 km. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 224202 e. kl. 15

NISSAN SUNNY
diesel stationcar, árg. 86, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 212533

FÝRA PÍKADEKK
á felgum, við skálum, 5 hol, passa til Toyota Carina II, biliga til sølu.
Tlf. 254535

TIL SØLU
Nissan Patrol 2.8 TD, árg. 90, hvítur, sýnaður í juli 01, koyrt 225.000 km, sær gott út.
Tlf. 254535

EYKALUTIR
til Toyota Hiace diesel, árg. 90-95, til sølu.
Tlf. 227922

EYKALUTIR
til Toyota Carina St. 171 og 88-91: hurðar, bakrútur, spegl, startari, drívaksil og kúfangari framman til sølu.
Tlf. 227922

FORD FIESTA
árg. 92 í góðum standi til sølu, nýsýnaður, ongan kross. ring
tlf. 310659 best eftir kl 17

YNSKIST TIL KEYPS
Volvo 340 DL við fronskum motori.
Tlf. 424270 - 286504

Arbeiði

SØKT VERDUR
eftir fólki, ikki undir 18 ár, til fyrrapartsarbeiði, mánadag-friggjadag skjótast gjørligt.
Fish & Chips, tlf. 317405 ella 320220

VASKIARBEIÐI SØKIST
16 ára gomul genta í Havn søkir eftir vaskiarbeiði uml. 4 tímar um vikuna.
Tlf. 314539 - 253447

URTAGARÐSARBEIÐI
verður gjørt.
Tlf. 310352

ARBEIÐI SØKIST
Er nakar, sum manglar dekkara við snellubáti úr Klaksvík.
Tlf. 223282 e. kl. 16

Barnaútgerð

YNSKIST
Bilstólur, 9 kg +, ynskist til keyps.
Tlf. 424048

BABYLIFT
Vínreyð/blá babylyft til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 223217

TIL SØLU
Vælhildin bláur Simo barnastólur. Bilstólur upp til 15 kg. Lítið brúkt rimasong.
Tlf. 317150 - 217150

TIL SØLU
Góð baby dreingjaklæði, std. 62-80. Ein Brio dukkuvognur, fyrr 1.000 kr., nú 500 kr., í góðum standi. Aktivt teppi v/ tónleiki, 200 kr. Gangistólur, fyrr 600 kr., nú 300 kr. Babyborn dukka, klæðir og útstýr.
Tlf. 310383 - 250051

BARNAVOGNUR
Vælhildin »Odder« barnavognur við tilhoyrandi babylyft og madrassum til sølu.
Tlf. 311688 eftir kl. 18

TIL SØLU
Pusliborð við baðikari til sølu fyri kr. 600,- Nýprísur kr. 1.000,-
Tlf. 316817 eftir kl. 17

BARNAVOGNUR VIÐ LYFT
Bláur Brio barnavognur við lyft til sølu fyri 2600 krónur.
Tlf 311792 ella 263992

TIL SØLU
Ein sera væl viðfarin myrkbláur barnavognur av slagnum Silver Cross við lyft til sølu. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 253062

YNSKIST
Er nakar, ið hevur ein barnavogn við lufthjólum og regulerbarum hondtaki til sølu.
Tlf. 313074

BARNAVOGNUR
Myrkbláur Silver Cross barnavognur við dýnu, kodda og regnslagi til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 456272

TIL SØLU
Myrkareyð babylyft og hvít rimasong biliga til sølu.
Tlf. 317637

Bátaútgerð

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er ein 28 fót súðubygdur træ bátur frá 72 til sølu. Klárur til fiskiskap við snellu og línu. Treingir til ábotur.
Tlf. 441736 - 288736 - 224975

PLASTBÁTAHURÐ
til sølu fyri 2.000 kr. Longd 135,5 cm, breidd 74,5 cm.
Tlf. 224883

BÁTUR YNSKIST
Eg ynski at fáa bát at rógva út við, tá eg eri heima imillum túrar. Eg fari væl um. Keyp av báti er eisini av interessu.
Tlf. 311105

BÁTUR TIL SØLU
21 fót frambygdur plastbátur við 26 HK dieselmotori til sølu um hoskandi boð fæst.
Tlf. 314223 ella 210599

YNSKIST
Er nakar, ið ynskir at fáa bátin ansaðan, vil eg fegin taka mær av tí.
Tlf. 318117

YNSKIST
Bátur 6-8 mannafar ynskist til keyps. Millum kr. 10.000-20.000,-
Tlf. 318117

YNSKIST TIL KEYPS
Bátur 26-30 fót við fiskiloyvi ynskist til keyps.
Tlf. 447769

Bingo

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur páskabingo í Losjuni, Tinghúsvegur 18, hóskvøldið 21. mars kl. 18.00. Limirnir kunnu hava gest við.
Nevndin

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 15. apríl kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

SUÐUROYINGAR!
Gott bingo verður í Framtíðini mánakvøldið 8. apríl kl. 19.30. Full pláta 300 kr.
Skótarnir í Vági

GOTT PÁSKABINGO
verður í Ranhøll í Sandvík skírsdag kl. 17.00. Nógvir góðir vinningar. Drigið verður um páskaegg millum spølini. Á lutaseðli verður so sum videoborð og gávukort. Eykaspælið nú 2.100 kr.
Bygdafelagið á Rananum

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 23. mars kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

BINGO
verður í VB-húsinum tórsdagin kl. 19.30. 300 kr. til fulla plátu.
Vágs Bóltfelag

EB/STREYMUR
Árliga páskabingo verður í Eydnuni á Oyrarbakka 2. páskadag kl. 16.00.
EB/Streymur

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 26. mars kl. 19. Gávukort til fulla plátu. Á lutaseðlinum 2 x 1000 kr. og 2 x 500 kr.
Astma- og Allergifelagið

PÁSKAEGG
Stórt páskaeggjatombola verður leygardagin frá kl. 10-13 og frá 19-22. Ein ørgrynna av eggum, uml. 1.000. Eisini verður 50.ari, har tú kanst vinna eitt stórt føroyskt páskaegg. Føroya størsta. Vælkomin.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

SUÐUROYINGAR
Bingo verður í Gistingarhúsinum í Øravík 2. páskadag, 1. apríl, kl. 17.00.
Bygdarhúsfelagið í Hovi

AB-STUÐLAR SKIPA FYRI
rimmar páskabingo í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 21. mars kl. 19.00. Páskaegg, páskamatur og nógv annað verður at vinna. Á lutaseðli tvær baljur fullar av mati. Páskaegg sum millumspæl. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 6. apríl kl. 16. 12 plátur 100 kr. Full pláta 300 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli eitt gávukort á 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

ADIDAS-HÚGVA
Rani hevur mist sína húgvu uttanfyri SMS hósdagin 7.3. Hevði tlf. nr. eisini staðið á, høvdu tit húgvuna aftur sama dag – altso ikki bara navn, men eisini tlf. nr. í klæðunum.
Tlf. 314213 eftir kl. 16.30

NOKIA-TELEFON BURTURMIST
Hevur nakar sæð mína Nokia-telefon? Eg misti hana vekk sunnudagin í Klaksvík, møguliga á Fimleikaframsýningini. Telefonin er grøn og reyð og glittar. Um onkur hevur funnið hana, ring so á 457023, ella legg hana inn á Sosialin í Klaksvík
Tlf. 457023

Býli

TIL LEIGU Í TÓRSHAVN
Møblerað íbúð, 65 fermetrar, (stova, kamar + div.), til framleigu frá 1. juni til 1. sept. Kostnaður 4.000 um mør. + 1 mør. depositum.
Tlf. 252806, kl. 19-20

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung genta søkir eftir lítlari íbúð á Argjum ella í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 317490 ella 251337

TIL LEIGU
60 fermetrar stór íbúð í vesturbýnum til leigu frá 1. apríl.Er vælegnað til tvey fólk.
e-mail: ludde@tiscali.dk

ÍBÚÐ YNSKIST
Eg eri ein ungur politistur, sum eftir lokna útbúgving í Keypmannahavn havi fingið starv í Tórshavn. Eri í bústaðarneyð og søknist tí eftir íbúð í høvuðsstaðarøkinum.
Tlf. 265051

HANDILSHÚS
í Vági til leigu.
Tlf. 217335

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt par søkir íbúð í Havn, Hoyvík ella á Argjum. Roykja ikki, bæði hava fast starv og gjalda til tíðina.
Tlf. 254668, e. kl. 17.30

HANDILS-/SKRIVSTOVUHØLI
Nýumvælð høli, 80 fermetrar, í Varðagøtu 8, til leigu frá aug./sep. 2002. Liggja í veghædd og parkeringsøki er uttanfyri. Áhugað kunnu venda sær til Yrkisfelag Studentaskúla- & HF-lærara,
Tlf. 311916

KAMAR YNSKIST Í KBH.
Kamar við atgongd til bað ynskist til leigu frá 15. apríl til 1. juli. Arbeiði sum sjúkrasystir, royki ikki.
Tlf. 211515 - 421710

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru eitt ungt par, ið søkja íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Bæði hava fast starv, eingi børn, friðarlig, drekka ikki, roykja ikki og fara væl um. Alt hevur áhugað. Vinarliga ring
tlf. 260165 og 254741

NØKUR KØMUR TIL LEIGU
Nøkur kømur til leigu - nýtt og gott. Atgongd til bað, køk og vaskirúm.
Tlf. 217300

ÍBÚÐ YNSKIST
Søkt verður eftir lítlari íbúð í Tórshavn.
Tlf. 318739 e. kl. 17

KAMAR YNSKIST
Sjómaður í 30-unum ynskir kamar til leigu í Havn. Má hava atgongd til køk og bað.
Tlf. 228009 - 321646

ÍBÚÐ YNSKIST!!!
Ungt par við einum barni (4 ár) søkir hús/íbúð til leigu í Havn. Vit eru friðarlig, fara væl um og gjalda til tíðina. Má hava 2 kømur og max 5.000 kr. um mánaðin við øllum – alt hevur áhuga. Um nakar kann hjálpa okkum, vinarliga ring
tlf. 252783

SETHÚS Í VÁGI
til sølu. Húsini eru bygd í 1988 og nýupppussaði innan í 2001. Húsini standa uppi í Gjógvarábø. Áhugaði kunnu ringja
tlf. 373675 ella 263035

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma søkir íbúð við 2 kømurum í Havn. Má ikki kosta meira enn 4.000,- kr. um mør.
Tlf. 255913

TIL LEIGU Í DK
Raðhús, 180 fermetrar, nær Keypmannahavn (Nivå) til leigu frá 1/8. Liggja 2 min. frá Kystbanatokstationini, nær innkeypssentur, barnaskúla, dagstovnar, sandstrond og skóg. Sera barnavinarligt umhvørvi við fleiri spælipláss.
Tlf. 311430

ÍBÚÐ YNSKIST
Trúgvandi familja ynskir íbúð í Havn skjótast tilber.
Tlf. 313259

SUMMARFRÍ Í ÁRHUS
Modernað íbúð í Århus City (Frederiksgade) til leigu frá 13. juli til 27. juli. 5 sovipláss. Kostnaður 3.000 kr. pr. viku.
Tlf. 0045-86130448, e. kl. 17

KAMAR TIL LEIGU
v/ atgongd til køk, baðirúm, vaskirúm og felagsrúm. Til fólk, ið ikki roykir.
Tlf. 317425, e. kl. 18

HØLI Í MIÐBÝNUM
til leigu frá 1. apríl. 200 fermetrar. Skriva til: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 438

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo
Tlf 311197

Dýr

TIL SØLU
Kanariefugle (hanner).
Tlf. 228058

TIL SØLU
Undulater kr. 200 pr. stk.
Tlf. 228058

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 912
Stað: Suðurstreymoy
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 100 m² (2–3 kømur)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.300.000,-

Nr. 913
Stað: Sundalagnum
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 60 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 500.000,-

Nr. 914
Stað: Streymoynni
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 100-120 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 800.000,-

Nr. 916
Stað: Kvívík ella Skopun
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Ongar treytir
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 600.000,-

Nr. 917
Stað: Sundalagi, Hvalvík/Streymnes
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Ongin treyt
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.000.000,-

Grundøkir:

Nr. 882
Stað: Norðstreymoy ella Skálafjørðinum
Slag av veiðu: Jørð – Grundøki
Stødd: Uml. 1000-15000 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 200.000,-

Nr. 906
Stað: Tórshavn, Argir ella Hoyvík
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: 500 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 300.000,-

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

HUNDAHVØLPUR
Átta vikur gamal hundahvølpur fæst við at avheinta hann. Hundur, lítið hundaslag.
Tlf. 457461

KETTLINGAR
Grá/hvítir kettlingar, lagdir 7. og 8. mars, kunnu latast djóravinum tá ið teir eru uml. 8-10 vikur.
Tlf. 448435 eftir kl. 17

GÁSABØGA YNSKIST
Gásaboga ynskist til keyps. Hevur onkur eina gásabogu at selja mær?
Ring tlf. 212526

HUNDAHVØLPAR
Tveir fittir hundahvølpar, ein tík og ein hundur, fáast um 4 vikur við at koma eftir teimum.
Tlf. 441858

KETTLINGUR
Gráur/hvítur, 6 vikur, kann fáast við at koma eftir honum.
Tlf. 319806

TIL SØLU
Eitt stórt fuglabúr við 2 zebra-finkum og øllum tilhoyri til sølu fyri kr. 600,00.
Tlf. 442088

LABRADORTÍK
13 mør. gomul labradortík verður latin djóravini vegna flyting. Hon er svort, sera góð í sær og lýðin. Er von við børn og fremmand fólk.
Tlf. 371067 / 260739, e. kl. 19

Fundir

AÐALFUNDURIN
hjá Havnar Traðarmannafelag verður í hølunum hjá Føroya Riðingarfelag mikukvøldið 10. apríl 2002 kl. 19.30. Dagsskrá: Sambært lógum felagsins.
Nevndin

HAGAFUNDUR
Heimara helvt á Bjørgum í Vestmanna lýsur til nýggjan hagafund tann 27.03. kl. 19.00 á løngjaldstovuni við somu dagsskrá.
Hagastýrið

ARGJA RÓÐRARFELAG
Aðalfundur verður í neystinum 10. apríl kl. 19.00. Skrá sambært lóg felagsins.
Argja Róðrarfelag

ÁRSAÐALFUNDUR
Eldrafelagið Vesturskin hevur ársaðalfund í skúlanum í Vestmanna tann 3. apríl kl. 19.00.
Nevndin

NORRØNA FELAGIÐ
Í FØROYUM. Ársaðalfundur verður í Jákupsstovu, J. Paturssonargøtu 24, mikudagin 3. apríl 2002 kl. 19.30.
Nevndin

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Lítið brúktur Voss komfýrur til sølu fyri kr. 3.200,-
Tlf. 316817 eftir kl. 17

KØLISKÁP
við frystirúmi mát 105 x 55 x 57 er frá des. 98, verður selt vegna flyting uttanlands.
Tlf. 213880

Innbúgv

MARMOR SPÍSIBORÐ
til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 315991 ella 215991

TIL SØLU
Lútað bókareol, 800 kr. Køksborð, 200 kr.
Tlf. 214142

TIL SØLU
Vegna plásstrot er ein skenkur/vitrineskáp til sølu. Er úr lútaðum træi. Stødd 185 cm. h. og 103 cm. b.
Ring 316813

TIL SØLU
Ein so gott sum nýggj hornasofa til sølu vegna plásstrot.
Tlf. 318406 - 283406

TIL SØLU
Niðurtikin klædnaskáp og kokur v/ hvítvørum biliga til sølu.
Tlf. 225028

TIL SØLU
Song 140 x 200. Bert brúkt í 1/2 ár. Prísur sum nýggj kr. 6.000,- verður seld fyri kr. 3.000,-
Tlf. 223264 e. kl. 16

ANTIK KOMMODA
við 5 skuffum, úr furutræi, til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 319083

REOL
biliga til sølu vegna flyting. Sær út sum nýggj.
Tlf. 317226

Pløgg

YNSKIST
Troyggja og skjúrt til før. búnan, std. 42, ynskist til keyps.
Tlf. 424014

TIL SØLU
Ráhvítur brúðargentukjóli, std. 7 ár, og skógvar, std. 32, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 214142

Samband

SAMBAND YNSKIST
Einligur maður um 50 ára aldur ynskir samband við kvinnu í hóskandi aldri. Vinarliga skriva nakrar reglur og send tær til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 250

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður á Svangaskarði mánakvøldið kl. 18.30.
B68

SJAVSKAPPING
verður í Felagslonini fríggjakvøldið 22. mars kl. 19.00.
Eldrafelagið Borgin

SJAVSKAPPING
verður í Menningarfelagnum í Gøtu sunnudagin 24. mars kl. 15.00.
Felagskórið Gøta/Leirvík

Súkklur

SUZUKI 750 GSX 85''
38.000 km, vælhildin, biliga til sølu vegna bilkeyp. Ger skjótt av, 20.000 kr. og ein »feit« súkkla er tin.
Tlf. 252806, kl. 19-20

YNSKIST
Aprilia SR 50 LC skutari ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 250658

TIL SØLU
Ein Derby Zenda SM motorcross, árg. 01/2002, koyrt uml. 1.000 km.
Tlf. 250658

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
650cc sær hampuliga gott út.
Tlf. 215252

HYGG HER!
Skutari, sum er sum nýggjur, til sølu um hóskandi boð fæst. Er karrylitaður.
Tlf. 313976 - 213976

TIL SØLU
Damusúkkla til sølu. Prísur sum nýggj kr. 6.200,- verður seld fyri kr. 2.000,- Ring á
tlf. 223264 e. kl. 16

Teldur

CD-BRENNARI
ein 40/24/12 liteon cd-brennari, brennur 24x, lesur 40x, endur brennur 10X, til sølu fyri kr. 1500.
Tlf. 313471

ER TAÐ NAKAR
ið kann lata mær ein skerm ella eitt kabinett. Ella selja tað biliga.
Tlf. 313471

TIL SØLU
Telduborð til sølu fyri 150 kr.
Tlf. 315991 ella 215991

FARTELDA
Compaq, 466 MHz, 192 MB ram, TFT skærm, modem, DVD-drev. Kvalitet. Kraftig nok til alle dine programmer. Prøv den og bliv overbevist! Nypris for 17 måneder siden: 13.999 kr. Pris nu: 7.500 kr.
Tlf. 371843

NINTENDO 64
spøl til sølu. Øll 19 fyri kr. 2.000,- ella pr. stk. 200 kr.
Tlf. 315221

SERA GÓÐ TELDA TIL SØLU
1,5 GHz, 40 GB harddisk, 19" skerm, cd-rom/dvd + brennara, Geforce 64 MB skermkort, soundbl. live ljóðkort, góðir hátalarar v/ subwoofara, ein rúgva av góðum spølum, til sølu fyri bara 11.000 kr. Nýprísur 18.000 kr.
Tlf. 320443 - lokal 173 kl. 8-16

SPØL
til Nintendo 64 til sølu: Diddy Kong Racing 75,- kr. Superstar Soccer 98 200 kr. Superstar Soccer 64 200 kr. Turok 200 kr.
Tlf. 375291 ella 222092

TELDA TIL SØLU
1200Mhz AMD Athlon CPU, 256 DDRAM, 40GB IBM (7200 rpm) harddisk, Onboard 5.1 kanal ljóðkort, 56Kb modem, optisk Logitech mús, Trust 3D 40W RMS hátalarar, ATI Radeon 7000, 32MB DDR 3D graffikkort 52x CD-ROM, Office XP, Windows XP pro. – Selist vegna keyp av størri. Uttan skerm: kr. 8.900,-
Tlf. 256757

TELDA TIL SØLU
666 MHz. AMD Athlon Motherboard 192 Mb ram. Geforce 256 grafikkort. 40 GB harddisk, 100 MB netkort, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 254584

Tónleikur

BILSTEREO
Eitt Panasonic bilstereo, ein forsterkari og ein subwoofari, lítið brúkt, til sølu fyri 3.000 kr. Nýprísur 6.200 kr. Anleggið fer einsamalt fyri 2.000 kr.
Tlf. 211960

Ymiskt

PÁSKATILTAK
í Argja skúla 23. mars kl. 15.00 til frama fyri námsferð hjá 9.b til Tunesia: Mattombola - Bommtombola - Fiskibrunnur - Hoppiborg - Kafé - Lutaseðlar - Reingerð av bilum innan - Rør at skreiða í - Páskapynt til sølu - Gandakallur - Bóltakast. 9.b undirheldur við sangi og felagsspølum. Vit takka fyri stuðulin. Møtið fjølment!
9.b

TIL SØLU
Tveir bakaríovnar, ein heviskáp, eitt vindeygabrúgv o.a. Eisini fæst ein termorútur við at koma eftir honum, std. B=170, H=150.
Tlf. 455848

YNSKIST
Er nakar, sum hevur eina góða, brúkta bindimaskinu at selja mær? Prísuppskot 3.000 kr.
Tlf. 374849

MÁLNINGAR TIL SØLU
Ein oljumálningur av Tinganesi fyri 2.500 kr. Stødd 55x80 cm. Oljumálningur av Vágsbotni fyri 1.500 kr. Stødd 55x40 cm.
Tlf. 316016

AMNESTY INTERNATIONAL
Amnesty International Føroya Deild takkar øllum fyri stuðulin til køkutombola, sum var í SMS 15. og 16.3. Peningurin, sum kom inn, fer óskerdur til arbeiðið hjá felagnum.
Nevndin

APEX FERÐASEÐIL
Vágar-Keypmannahavn og aftur við Atlantic Airways biliga til sølu.
Tlf. 442088

TIL SØLU
Rullískoytur, std. 38, hjálmur, knæverjur og hondverjur til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 214142

STÓRT PÁSKATILTAK
í Argja skúla 23. mars kl. 15. Mattombola, Bommtombola, Fiskibrunnur, Hoppiborg, Bóltakast, Rør at skreiða íggjognum, Kafé, Gandakallur, Páskaklipp, Bilvask innan, Lutaseðlar.
9.B í Argja Skúla

PÁSKAPRÝÐI
Vit hava nakað av páskaprýði og nógv annað so sum gávulutir til børn og vaksin. Handilin er opin mánadag til hósdag kl. 9.00–15.30, fríggjadag kl. 9–13.00. Vardi Verkstaðurin, inni á Bakka í Vági,
tlf. 373536

NOKIA 3330 TIL SØLU
Nokia 3330 hevur fimm spøl, WAP og nógv annað.
Tlf. 316212

HALLÓ
Basarur verður í Kvívík 5. mai. Vónandi verður undirtokan eins góð, sum seinast.
Skótarnir, KSR og Glæman

YMIST TIL SØLU
Hvít dupultsong við madrassum 180 x 200 + 2 náttborð 1.000,- kr. wc og brúsubakki – hvitt – 600,- kr. Furu úthurð við rúti 1.000,- kr.
Tlf. 444930

TIL SØLU
Hvítir marmor flísar við gráum lindum 30 x 30 x 1 cm. 43 kvm.

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……..
Bygd/býur:……..
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki